# Fótbóltssamband Føroya

## Ársroknskapur

## 2013

| Til P/F Januar |
| --- |

Ársroknskapurin fyri 2103 er lagdur fram og góðkendur á ársaðalfundi, tann _____ / _____ - 20_____ .

___________________________________

Fundarstjóri

# Innihaldsyvirlit


Síða

**Átekningar**

Leiðsluátekning 1

Átekning frá óheftum grannskoðara 2

**Upplýsingar um FSF**

Upplýsingar um FSF 4

**Ársroknskapur 1. januar - 31. desember 2013**

Nýttur roknskaparháttur 5

Rakstrarroknskapur 8

Fíggjarstøða 9

Notur 11

# Leiðsluátekning

Nevndin hevur í dag viðgjørt og samtykt ársroknskapin fyri 2013 hjá Fótbóltsambandi Føroya.

Tað er okkara fatan, at nýtti roknskaparhátturin er hóskandi, og at ársroknskapin gevur eina rættvísandi mynd av ognum, skyldum og fíggjarligu støðuni pr. 31. desember 2013 og av úrslitinum av virkseminum fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2013.

Ársroknskapurin verður hervið lagdur fyri ársaðalfundin til góðkenningar.

Tórshavn, tann 5. februar 2014

**Dagligt leiðsla**

Virgar Hvidbro
aðalskrivari

**Nevnd**

| | | |
|---|---|---|
| Christian Andreasen<br>forseti | Róin Schrøter<br>varaforseti | Fríðin Ziskason |
| Heðin D. Poulsen | Trygvi Mortensen | Jákup Martin Joensen |
| Jógvan Páll Joensen | | |

## Átekning frá óheftum grannskoðara

**Til leiðsluna í Fótbóltssamband Føroya**

Vit hava grannskoðað ársroknskapin hjá Fótbóltsambandi Føroya fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2013, við nýttum roknskaparhátti, rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu, og notum.

**Ábyrgd leiðslunnar av ársroknskapinum**

Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera ein ársroknskap, ið gevur eina rættvísandi mynd. Leiðslan hevur harumframt ábyrgdina av innanhýsis eftirlitinum, ið leiðslan metir skal til fyri at ein ársroknskapur kann gerast uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum.

**Ábyrgd grannskoðarans**

Okkara ábyrgd er, við støði í grannskoðanini, at gera eina niðurstøðu um ársroknskapin. Vit hava grannskoðað samsvarandi altjóða standardum um grannskoðan og eftir øðrum ásetingum í føroysku grannskoðanarlóggávuni. Hetta krevur, at vit halda tey etisku krøvini og leggja til rættis og grannskoða fyri at fáa grundaða vissu fyri, at tað ikki eru týðandi skeivleikar í ársroknskapinum.

Grannskoðanin ber í sær, at gjørd verða tey grannskoðanararbeiði, sum skulu til fyri at fáa grannskoðanarprógv fyri upphæddum og upplýsingum í ársroknskapinum. Grannskoðarin metir um, hvat arbeiði skal gerast, herundir metir hann um vandan fyri týðandi skeivleikum í ársroknskapinum, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum. Í váðametingini hevur grannskoðarin eisini innanhýsis eftirlitið í huga, ið skal til fyri at felagið kann gera ein ársroknskap, sum gevur eina rættvísandi mynd. Hetta verður gjørt fyri at leggja grannskoðanina til rættis eftir umstøðunum og ikki fyri at gera eina niðurstøðu um dygdina á innanhýsis eftirlitinum. Grannskoðanin ber eisini í sær, at mett verður um roknskaparhátturin, sum leiðslan nýtir, er hóskandi, um tær roknskaparligu metingar, sum leiðslan hevur gjørt eru rímiligar, og hvussu ársroknskapurin sum heild er gjørdur.

Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kann vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

Grannskoðanin hevur ikki givið orsøk til fyrivarni.

## Átekning frá óheftum grannskoðara

**Niðurstøða**

Tað er okkara fatan, at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av ognum, skyldum og fíggjarligu støðu pr. 31. desember 2013 og av úrslitinum av virkseminum í roknskaparárinum 1. januar - 31. desember 2013.

Tórshavn, tann 5. februar 2014

**P/F Januar**
løggilt grannskoðanarvirki

Jógvan Amonsson
statsaut. revisor

## Upplýsingar um FSF

| | | |
|---|---|---|
| **Felagið** | Fótbóltssamband Føroya<br>Gundadalur<br>Postboks 3028<br>110 Tórshavn | |
| | Telefon: | 35 19 79 |
| | Telefaks | 31 90 79 |
| | Heimasíða | www.football.fo |
| | Kommuna: | Tórshavn |
| | Roknskaparár | 1. januar - 31. desember |
| **Nevnd** | Christian Andreasen, Tórshavn, forseti<br>Róin Schrøter, Hvalba, varaforseti<br>Fríðin Ziskason, Klaksvík<br>Heðin D. Poulsen, Tórshavn<br>Trygvi Mortensen, Runavík<br>Jákup Martin Joensen, Tórshavn<br>Jógvan Páll Joensen, Sørvágur | |
| **Daglig leiðsla** | Virgar Hvidbro, Tórshavn, aðalskrivari<br>Kirstin Dam Ziska, Tórshavn, varaaðalskrivari | |
| **Grannskoðan** | **P/F Januar**<br>løggilt grannskoðanarvirki<br>Hoyvíksvegur 5, postrúm 30, FO-110 Tórshavn<br>Telefon: 31 47 00 - Telefaks: 35 17 01<br>Teldubústaður: januar@januar.fo<br>Heimasíða: www.januar.fo | |

## Nýttur roknskaparháttur

Ársroknskapurin fyri 2013 hjá Fótbóltsambandi Føroya er uppsettur eftir roknskaparháttinum, ið er lýstur niðanfyri. Tann nýtti roknskaparhátturin er óbroyttur í mun til undanfarna ár.

### Alment um innrokning og virðisáseting

Í rakstrarroknskapinum verða inntøkur innroknaðar, so hvørt tær verða vunnar. Sama er galdandi fyri virðisjavning á fíggjarligum ognum og skyldum. Í rakstrarroknskapinum verða somuleiðis allir kostnaðir innroknaðir, herí avskrivingar, niðurskrivingar, avsettar skyldur og afturføringar, sum standast av broyttum roknskaparligum metingum viðvíkjandi upphæddum, ið áður hava verið innroknaðar í rakstrarroknskapin.

Ognir verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá sannlíkt er, at tær í framtíðini geva felagnum fíggjarligar fyrimunir, og virðini kunnu ásetast álítandi.

Skyldur verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá sannlíkt er, at tær í framtíðini taka fíggjarligar fyrimunir úr felagnum, og virðini kunnu ásetast álítandi.

Við fyrstu innrokning verða ognir og skyldur virðisásettar til útveganarvirði. Síðani verða ognir og skyldur virðisásettar, sum greitt er frá niðanfyri um einstøku roknskaparpostarnar.

Ávísar fíggjarligar ognir og skyldur verða virðisásettar til amortiserað útveganarvirði, har ein støðug effektiv renta verður innroknað yvir tíðarskeiðið. Amortiserað útveganarvirði verður uppgjørt sum upprunaligt útveganarvirði frádrigið møguligan avdrátt, umframt ískoyti/frádrátt av akkumleraðu amortiseringini av muninum millum útveganarvirði og áljóðandi virði. Á henda hátt verður kurstap og kursvinningur býttur á ogn og skuld yvir tíðarskeiðið.

Við innrokning og máting verður atlit tikið til væntað tap og váðar, ið vísa seg áðrenn ársfrásøgnin er liðug, og sum kunnu sanna ella avsanna viðurskifti, sum vóru til staðar við roknskaparlok.

### Umrokning av fremmandum gjaldoyra

Handlar í fremmandum gjaldoyra verða umroknaðir til kursin, sum er galdandi á handilsdegnum. Gjaldoyramunir, millum handilsdagin og gjaldsdagin, verða innroknaðir í rakstrarroknskapin sum ein fíggjarpostur.

Áogn, skuld og aðrir peningaligir postar í fremmandum gjaldoyra, sum ikki eru avroknaðir við roknskaparlok, verða innroknaðir til gjaldoyrakursin við roknskaparlok. Munurin millum gjaldoyrakursin við roknskaparlok og kursin, ið var galdandi á upptøkudegnum, verður innroknaður í rakstrarroknskapin undir fíggjarpostum.

Støðisogn, ið er keypt í fremmandum gjaldoyra, verður innroknað til kursin á handilsdegnum.

# Nýttur roknskaparháttur

## Rakstrarroknskapur

### Nettosøla

Inntøkan er øll fakturerað inntøka, har vøran ella tænastan er veitt keyparinum innan árslok, umframt atgongumerkjasøla.

Stuðul og aðrar sáttmálatengdar inntøkur verða tiknar við og tíðargreinaðar, samsvarandi sáttmála innihaldinum.

### Kostnaðir

Rakstrarkostnaður fevnir um allan kostnað, sum knýtir seg til høvuðsraksturin hjá FSF.

### Fyrisitingarkostnaður

Fyrisitingarkostnaður er kostnaður, ið er farin til at leiða og at fyrisita fótbóltssambandið, íroknað kostnað til fyrisitingarstarvsfólk, leiðslu, skrivstovuhøli, skrivstovukostnað og avskrivingar. Mvg-regulering svarar til tann partin av meirvirðisgjaldinum, sum FSF ikki fær endurrindað. Endurrindanin er bert lutvís.

### Starvsfólkakostnaður

Starvsfólkakostnaður fevnir um allan kostnað, sum stendst av at hava fólk í starvi. Tað er lønar- og eftirlønarkostnaður og øll sosial gjøld.

### Fíggjarpostar

Fíggjarligar inntøkur og kostnaðir eru rentuinntøkur og rentukostnaður, staðfestur og óstaðfestur kursvinningur og kurstap viðvíkjandi ogn, skuld og handil í fremmandum gjaldoyra, amortisering av fíggjarligum ognum og skyldum. Fíggjarligar inntøkur og kostnaðir verða innroknaðir við teimum upphæddum, sum viðvíkja roknskaparárinum.

## Fíggjarstøðan

### Materiell støðisogn

Bygningar, rakstrargøgn og innbúgv verða tikin við til útveganarvirði, frádrigið akkumuleraðar avskrivingar og niðurskrivingar.

Avskrivingargrundarlagið er útveganarvirði við væntaðum restvirði eftir lokna nýtslutíð frádrignum.

Útveganarvirðið er keypsprísurin, umframt kostnað, ið beinleiðis er knýttur at ognini, til hon er klár at taka í nýtslu.

## Nýttur roknskaparháttur

Tær linjeru avskrivingarnar eru grundaðar á fylgjandi metingar av væntaðu livitíðini:

| | |
|---|---|
| Bygningar | 25 ár |
| Onnur tól, rakstrargøgn og innbúgv | 3-5 ár |

Smáamboð við útveganarvirði undir 20 t.kr. t.kr. verða útreiðsluførd í útveganarárinum.

Vinningur ella tap við at avhenda materiella støðisogn verður uppgjørdur sum munurin millum sølupris og roknskaparliga virðið á søludegnum, frádrigið sølukostnað. Vinningur ella tap verður innroknað í rakstrar-roknskapin undir avskrivingum.

Íløgur, ið eru fíggjaðar við stuðli, ella sum eru gjørdar saman við øðrum, verða upptiknar netto og FSF-parturin avskrivaður yvir raksturin. Stuðul verður mótroknaður í bruttoíløgum.

**Goymslur**

Útveganarvirðið á goymslum verður roknað sum keypsvirði, umframt flutningsgjald.

**Áogn**

Áogn frá sølu og tænastuveitingum verður virðisásett til amortiserað útveganarvirði, sum vanliga svarar til áljóðandi virði. Niðurskrivað verður til nettorealisiónsvirðið fyri at standa ímóti møguligum tapi.

**Tíðaravmarkingar**

Tíðaravmarkingar, sum eru innroknaðar undir ogn, er goldin kostnaður, sum viðvíkur komandi roknskaparárnum.

**Skuld**

Skuld, sum fevnir um vøru- og tænastuskuld, og aðra skuld, verður tikin við til amortiserað útveganarvirðið, sum vanliga er áljóðandi virðið.

**Tíðaravmarkingar**

Í tíðaravmarkingum undir skuld verða móttikin gjøld fyri inntøkur, og forútgoldin stuðul til íløgur sum viðvíkja komandi roknskaparárum, innroknað.

## Rakstrarroknskapur 1. januar - 31. desember

| Nota | | 2013 | 2012 |
|---|---|---|---|
| 1 | Inntøkur | 33.816.446 | 31.842.940 |
| 2,4 | Kostnaður | -21.878.983 | -15.979.237 |
| | **Bruttoúrslit** | **11.937.463** | **15.863.703** |
| 3 | Fyrisitingarkostnaður | -11.258.969 | -12.153.264 |
| | **Rakstrarúrslit** | **678.494** | **3.710.439** |
| | Fíggjarligar inntøkur | 272.800 | 57.954 |
| | Fíggjarligir kostnaðir | -55.619 | -64.705 |
| | **Ársinsúrslit** | **895.675** | **3.703.688** |

**Uppskot til býti av úrsliti**

| | 2013 | 2012 |
|---|---|---|
| Flutt úrslit | 895.675 | 3.703.688 |
| **Býtt tilsamans** | **895.675** | **3.703.688** |

# Fíggjarstøða 31. desember

| Nota | OGN | 2013 | 2012 |
|---|---|---|---|
| | | kr. | kr. |
| | **Støðisogn** | | |
| 6 | Stadion v.m. | 10.161.717 | 10.561.718 |
| 6 | Rakstrargøgn | 738.375 | 873.173 |
| | Materiell støðisogn tilsamans | 10.900.092 | 11.434.891 |
| | **Støðisogn tilsamans** | **10.900.092** | **11.434.891** |
| | **Ogn í umferð** | | |
| | Fótbóltslutir | 205.315 | 195.200 |
| | Vørugoymslur tilsamans | 205.315 | 195.200 |
| | Skuldarar | 2.459.411 | 2.025.619 |
| | Hattrick Grunnur | 0 | 125.998 |
| | Meirvirðisgjald | 2.440.997 | 3.174.402 |
| | Onnur áogn | 287.432 | 62.827 |
| | Áogn tilsamans | 5.187.840 | 5.388.846 |
| | Peningur | 38.019.329 | 6.130.472 |
| | **Ogn í umferð tilsamans** | **43.412.484** | **11.714.518** |
| | **OGN TILSAMANS** | **54.312.576** | **23.149.409** |

## Fíggjarstøða 31. desember

**SKYLDUR**

| Nota | | 2013 | 2012 |
|---|---|---|---|
| | | kr. | kr. |
| | **Eginogn** | | |
| 7 | Flutt úrslit | 19.213.467 | 18.317.792 |
| | **Eginogn tilsamans** | **19.213.467** | **18.317.792** |
| | **Skuld** | | |
| | MAFF (Menning av Fótbóltsfeløgum) | 0 | 1.354.871 |
| | Ognarar | 4.520.442 | 3.312.733 |
| | Hattrick grunnur (UEFA) | 15.593.678 | 0 |
| | Forútgoldið, viðv. sjónvarpsrættindum | 14.899.851 | 0 |
| | Onnur skuld | 51.101 | 89.470 |
| | Skyldug løn | 34.037 | 74.543 |
| | Stuttfreistað skuld tilsamans | 35.099.109 | 4.831.617 |
| | **Skuld tilsamans** | **35.099.109** | **4.831.617** |
| | **SKYLDUR TILSAMANS** | **54.312.576** | **23.149.409** |

# Notur

| | 2013 | 2012 |
|---|---:|---:|
| | kr. | kr. |
| **1. Inntøkur** | | |
| Atgongumerkir | 851.263 | 679.381 |
| Luttøkugjald, kapping og skeið | 1.225.802 | 758.841 |
| Kærugjøld | 88.900 | 99.500 |
| Kappingarskipanin og lýsingar | 1.007.196 | 654.200 |
| Sendirættindi v.m. | 15.015.923 | 14.903.916 |
| ÍSF - Landskassastuðul | 105.000 | 105.000 |
| UEFA v.m. | 11.843.747 | 11.176.133 |
| FIFA | 1.428.562 | 1.428.456 |
| ÍSF - Ítróttarvedding v.m. | 972.683 | 897.373 |
| Dómarakonventiónin | 745.000 | 618.000 |
| Aðrar inntøkur | 532.370 | 522.140 |
| | **33.816.446** | **31.842.940** |

**2. Kostnaður**

| | | |
|---|---:|---:|
| Landslið: | | |
| A-Landsliðið, menn | 10.598.498 | 7.292.677 |
| U-21 Landsliðið, menn | 2.065.534 | 971.882 |
| U-19 Landsliðið, menn | 632.009 | 641.055 |
| U-17 Landsliðið, menn | 1.358.723 | 1.384.721 |
| U-15 Landsliðið, menn | 362.451 | 365.543 |
| A-Landsliðið, kvinnur | 1.390.153 | 235.925 |
| U-19 Landsliðið, kvinnur | 650.808 | 494.885 |
| U-17 Landsliðið, kvinnur | 613.326 | 488.542 |
| Nevndir: | | |
| Kappingarnevndin | 347.168 | 485.601 |
| Dómaranevndin | 1.666.733 | 1.896.720 |
| Útbúgvingarnevndin | 2.193.580 | 1.721.686 |
| | **21.878.983** | **15.979.237** |

| | | 2013 | 2012 |
|---|---|---|---|
| | | kr. | kr. |
| **3.** | **Fyrisitingarkostnaður** | | |
| | Lønir og samsýningar | 4.989.881 | 4.752.628 |
| | Arbeiðsmarknaðargjøld og eftirlønir | 1.060.212 | 1.054.122 |
| | Skrivstovuhald | 500.619 | 508.531 |
| | Telefon, internet | 408.443 | 382.293 |
| | Ferðir og uppihald | 244.691 | 245.243 |
| | Umboðan | 149.449 | 187.730 |
| | Fundir | 1.066.597 | 1.012.935 |
| | Strategist arbeiði | 0 | 34.039 |
| | Bilar | 76.818 | 62.319 |
| | Húsið | 477.502 | 374.949 |
| | Stuðul | 613.390 | 515.333 |
| | Sakførari, ráðgeving og grannskoðan | 439.321 | 122.695 |
| | Regulering MVG | 513.013 | 577.085 |
| | Avskrivingar | 787.621 | 804.633 |
| | Annar kostnaður | 150.081 | 232.639 |
| | Kunning ísmb. v/landskappingar | 328.100 | 0 |
| | Avskrivað skuldarar | 107.833 | 16.090 |
| | MAFF Grunnur | -654.602 | 1.270.000 |
| | | **11.258.969** | **12.153.264** |

| | | 2013 | 2012 |
|---|---|---|---|
| **4.** | **Starvsfólkakostnaður** | | |
| | Fyrisitingarlønir og samsýningar | 4.989.881 | 4.752.628 |
| | Nevndararbeiði | 528.000 | 528.000 |
| | Aðrar samsýningar, venjarar, leikarar o.o. | 7.704.226 | 7.419.085 |
| | Bonus | 139.500 | 26.500 |
| | Arbeiðsmarknaðargjøld og eftirlønir | 1.060.212 | 1.054.122 |
| | | **14.421.819** | **13.780.335** |

### 5. Materiell støðisogn

| | Ljósmastrar | Tórsvøllur graslíki | Svangaskarð | Tórsvøllur Suður síðan |
|---|---|---|---|---|
| Útveganarvirði 1. januar 2013 | 16.956.192 | 8.180.762 | 8.155.308 | 516.898 |
| Tilgongd | 0 | 0 | 1.387.284 | 16.858.463 |
| Kommunupartur | -4.500.000 | -3.480.762 | 0 | -7.525.703 |
| **Útveganarvirði 31. desember 2013** | **12.456.192** | **4.700.000** | **9.542.592** | **9.849.658** |
| Stuðul U.E.F.A (Hattrick) | 12.456.192 | 2.480.000 | 9.542.592 | 9.849.658 |
| Stuðul F.I.F.A | 0 | 2.220.000 | 0 | 0 |
| **Niðurskrivingar tils.** | **12.456.192** | **4.700.000** | **9.542.592** | **9.849.658** |
| **Roknskaparligt virði 31. desember 2013** | **0** | **0** | **0** | **0** |

FSF hevur í árinum, saman við Tórshavnar kommunu, gjørt íløgur til nýggjan bygning á suðursíðuni á Tórsvølli. Harafturat eru gjørdar íløgur á Svangaskarði í 2013. Íløgurnar eru stuðlaðar av UEFA.

### 6. Materiell støðisogn (framhald)

| | Stadion v.m. | Rakstrargøgn |
|---|---|---|
| Útveganarvirði 1. januar 2013 | 17.261.717 | 5.519.619 |
| Tilgongd | 0 | 261.926 |
| **Útveganarvirði 31. desember 2013** | **17.261.717** | **5.781.545** |
| Stuðul Fø. Landsstýri | 2.700.000 | 0 |
| **Niðurskrivingar tils.** | **2.700.000** | **0** |
| Avskrivingar 1. januar 2013 | 4.000.000 | 4.646.447 |
| Avskrivingar í árinum | 400.000 | 396.723 |
| **Av- og niðurskrivingar 31. desember 2013** | **4.400.000** | **5.043.170** |
| **Roknskaparligt virði 31. desember 2013** | **10.161.717** | **738.375** |

| | 2013 | 2012 |
|---|---|---|
| **7. Flutt úrslit** | | |
| Flutt úrslit 1. januar 2013 | 18.317.792 | 14.614.104 |
| Fluttur vinningur ella hall í árinum | 895.675 | 3.703.688 |
| | **19.213.467** | **18.317.792** |